# Sigrun L. av Reyni fimmti



Í dag, 13 mars, fyllir Sigrun L. av Reyni 50 ár. Sigrun er kend fyri sítt blíða og fyrikomandi lyndi, og møtir tú henni, gevur hon sær altíð stundir til eitt prát, hóast hon hevur nógv um at vera.

Sigrun sleit sínar barnaskógvar "uppi á Varða" ella á Heiðavegi í Havn. Tað var tá eitt nýtt og spennandi øki við nógvum børnum - so har var lív í.

Pápin var Leif Lamhauge úr Lamba (doyði í nov. 2005), og mamman er Súsanna W. Lamhauge úr Smiðustovu í Havn. Sigrun eigur trý systkin, Sigurd, sum býr í Havn og tvær systrar í Danmark, Marjun og Margit.

Sigrun fór á húsarhaldsskúla í Vejle í 1974, og afturkomin fór hon í skrivstovulæru hjá grannskoðarafyritøkuni "Sundstein & Ellefsen" í Havn. Í 1975 giftist hon við Eivindi av Reyni. Sigrun hevur verið góður stuðul hjá manninum í menningini av virkinum p/f Reyni Service, og hevur hon sett síni fingramerki á fyritøkuna. Ja hon var eisini fremst í leiðsluni eitt stutt skifti, tá ið kreppan leikaði harðast á fyrst í 90-unum.

Sigrun og Eivind eiga fýra børn, Leif, Sigrid, Sámal og Christina.

Sigrun og familian hava haft ein serligan tokka til Hetland, har tey hava ferðast nærum á hvørjum ári síðan fyrst í 80-unum. Tey vóru eisini við, tá ið barnalegurnar byrjaðu har í 1994.

Sigrun og Eivind hava haft sína dagligu gongd í Ebenezer í mong ár, men tá ið brøður ynsktu at byrja eina brøðrasamkomu í vesturbýnum, gjørdu tey av at savnast har við vón um at kunna verða við til at stuðla nýstovnaðu samkomuna við Marknagil.

Sigrun er burturstødd føðingardagin.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Ellindur Olsen** úr Skálavík, andaðist á Áargarði á Sandi sunnudagin 11. mars 82 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Skálavíkar kirkju hósdagin kl. 13. Sungið verður úr Sálmabókini. Tey ið vilja minnast Ellind, kunnu lata eina peningagávu til Áargarð, konta í peningastovnunum.

**Lilly Øster**, Tvøroyri, andaðist á Eldrasambýlinum í Hvalba mánadagin 12. mars, 72 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinri.

**Jákup í Uppistovu**, Leirvík, andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin 80 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinri.

**Julianna Sivertsen**, fødd Nystrøm,Klaksvík, andaðist á Klaksvíkar sjúkrahúsi sunnudagin 11. mars 85 ára gomul.

Kistan við **Jóhan á Lava**, ættaður úr Tórshavn, búsitandi í Klaksvík, fer úr kapellinum á Klaksvíkar sjúkrahúsi í kvøld kl. 18. Jarðarferðin verður úr Betesda týsdagin kl. 13.

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt vinum og kenningum at

**Jákup í Uppistovu**
Leirvík

andaðist á Landssjúkrahúsinum
sunnudagin 11. mars, 80 ára gamal.

Bønarhald verður í Landssjúkrahúskappellinum
mikudagin 14. mars kl. 17.00.
Jarðarferðin verður úr Leirvíkar Kirkju
hósdagin 15. mars kl. 14.00.

*Vegna tey avvarðandi*
**Victoria og Jógvan Evald**

*Tey, ið ynskja at minnast Jákup, kunna geva Missiónshúsinum í Leirvík eina peningagávu, konta í peningastovnunum*

---

†

Sunnudagin 11. mars andaðist á Ellisheiminum
Áargarði á Sandi

**Ellindur Olsen**

Skálavík

82 ára gamal.
Jarðarferðin verður úr Skálavíkar kirkju
hósdagin 15. mars kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Jastrid**

---

†

**Kristin Guðmundsdóttir**

*nevnd Stina*

búsitandi í Keypmannahavn

andaðist sunnudagin 11. mars í Reykjavík
46 ára gomul

Jarðarferðin verður lýst seinni

*Vegna tey avvarðandi*
**Rudolf, Sofía og Sunneva**

---

# Tøkk

Hjartans tøkk fái tit, sum sýndu okkum samkenslu,
tá íð kæri bróður, morbróður og
ommubeiggi okkara

**Kristian Rasmussen**
Sandur

doyði og varð jarðaður
Tøkk til sangarar, berarar, og kirkjutænarar.
Tøkk til prest fyri vøkru og vælvaldu taluna.
Eisini ein tøkk til tykkum, ið hjálptu so væl
við ervinum.
Ein serlig til tøkk til tykkum á Áargarði,
ið vóru so góð við Kristian.
Tøkk til tykkum, ið fylgdu honum til hansara
seinasta hvíldarstað.

**Poula, Eyðbjørg, Sólva,**
**Finnur, Ann, Sólbjørn Fríði og Jóan Petur**

---

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum vistu samkenslu, tá
ið okkara kæri maður, pápi, verfaðir, abbi, mammu-
og ommubeiggi

**Anfinnur Justinussen**

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk til prestarnar Hera Joensen og Niels Pauli
Danielsen, kirkjutænarar, gravarar og tykkum, ið
hjálptu á annan hátt.
Tøkk fyri kransar, blómur og gávur til
Christianskirkjuna og Parkinsonfelagið.
Tøkk til tykkum øll, ið fylgdu honum til hansara
seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Anna, Heini og Áki**

---

## Dagurin

14. mars. **Euthycius**, deyður umleið ár 740. Tikin av døgum í Mesopotaniu.